## Sita ov leingi í varðhaldi

Plásstrotið í teimum donsku fongslunum er so stórt, at nógvir fangar noyðast at sita fleiri mánaðir í varðhaldi, áðrenn teir kunnu sleppa í eitt fongsul at sita dómin, sum teir hava fingið.

Tøl hjá myndugleikunum vísa, at tað eru serliga fólk, sum eru dømd fyri siðamisbrot, sum bíða leingi eftir at sleppa inn at sita dómin. Flemming Solberg, sum er formaður hjá teimum, sum arbeiða í donsku varðhaldshúsunum, segði við Jyllandspostin í gjár, at hann veit um ein mann, sum noyddist at sita 20 mánaðir í varðhaldi, áðrenn pláss var fyri honum í einum fongsli. Annette Esdorf, sum er varastjóri í Kriminalforsorgini, sigur við blaðið, at viðurskiftini eru ikki nøktandi. Hon hevur kortini eina vón um ein bata, tí í løtuni verða tvey donsk fongsul útbygd.

Men verjarnir vænta ikki, at útbyggingarnar loysa trupulleikan. Teir vísa á, at stjórnin hevur hert revsingina fyri ymisk lógarbrot uttan at geva sær far um, at herd revsing krevur drúgvari kanningar, og at fólk tí noyðast at sita longri í varðhaldi enn fyrr.

## Funnu fleiri hópgravir

Myndugleikarnir í Fílabeinsstrondini eru komnir fram á fleiri hópgravir, og higartil eru minst 99 lík grivin upp.

Starvsfólk hjá ST, sum arbeiða í Fílabeinsstrondini, siga, at hópgravirnar eru funnar í einum øki har norðuri í landinum, og sum uppreistrarmenn hava ræðið á. Talsmaðurin hjá ST-fólkunum sigur, at í teimum flestu førunum eru fólk skotin í høvdið, men eygnavitni hava eisini greitt frá, at fleiri vórðu kvald, áðrenn tey vórðu jarðað í hópgravunum.

Sambært ST vórðu hópgravirnar funnar í sambandi við nakrar samanbrestir ímillum tveir uppreistrarbólkar fyri einum góðum mánað síðani. Enn er ikki greitt, at fólkini í gravunum eru hermenn, ella um sivilfólk eisini eru jarðað har.

## Hugagóður svimjari

Tann 50 ára gamli slovenin Martin Strel hevur sett nýtt heimsmet. Seinasta fríggjadag kom hann til Shanghai eftir at hava svomið allan vegin oman eftir teirri 4.600 kilometrar longu Yangtze-ánni.

Tað tók slovenanum 50 dagar at svimja tann langa teinin. Hann sigur við blaðið Shanghai Daily, at tann størsti trupulleikin á ferðini var tann nógvi hitin. At hann kortini valdi at svimja eftir ánni um summarið komst av, at tá er áin rættiliga stríð, og tí er tað lættari at svimja oman eftir henni tá enn aðrar tíðir á árinum.

Hetta er ikki tað fyrsta metið, sum Martin Strel hevur sett. Fyri tveimum árum síðani setti hann heimsmet, tá hann svam 3.800 kilometrar eftir Missisippi-ánni í USA. Hann kom eisini í metbókina hjá Guinness, tá hann svam 3.004 kilometrar eftir Donau í 58 dagar. Hann eigur eisini eitt met, sum hann setti í 2001, tá hann svam 504 kilometrar í 84 tímar á Donau uttan at seta fótin á land.

## Tað vakrasta orðið

Í Týsklandi hevur tann almenna málnevndin biðið fólk koma við uppskotum um, hvat er tað vakrasta orðið í tí týska málinum.

Sambært BBC hevði nevndin fingið ein hóp av uppskotum, tá freistin var úti mánadagin. Málnevndin sigur, at hon hevur fingið fleiri stuttlig uppskot, men at summi veruliga hava gjørt sær ómak við at finna tað vakrasta orðið. Einføld orð sum eitt nú »Liebe« (kærleiki), »Sehnsucht« (longsul) og »Lebenslust« (lívsgleði) hava fingið nógvar atkvøður, sigur nevndin.

Málnevndin fer at lata ein bólk taka støðu til tey nógvu uppskotini, og úrslitið kemur ætlandi í oktober. Tann, sum vinnur, fær eina ferð til frítíðaroynna Mauritius.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Fólk vórðu stongd inni í brennandi handli

**Ákæruvaldið í Paraguay hevur skuldsett seks fólk í sambandi við handilseldin sunnudagin, sum higartil hevur kravt meiri enn 360 mannalív**

ELDSBRUNI
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Juan Pio Paiva (vm.) átti handilshúsini, sum brunnu í grund sunnudagin. Nú er hann skuldsettur fyri morð. Eisini sonur hansara, Victor Daniel Paiva (hm.). er skuldsettur*

Í gjár var talið á deyðum aftan á tann ógvusliga eldin í einum stórum handilshúsum í Paraguay sunnudagin komið upp á 364, men myndugleikarnir søgdu seg vænta, at fleiri av teimum umleið 500, sum liggja á sjúkrahúsi, fara at doyggja.

Fólk, sum sluppu livandi frá eldinum, hava greitt løgregluni frá, at tey sluppu ikki út, tí at vaktarmenninir stongdu dyrnar. Rafael Fernandez, ákæri, segði í gjár, at kanningar hjá løgregluni hava prógvað, at onkur hevði stongt dyrnar, og tí verður nú kannað, hvør gav boðini um at steingja tær.

Rafael Fernandez segði, at eftir øllum at døma fingu vaktarmenninir boð um at steingja allar dyrnar í handilshúsunum, tá eldurin kyknaði, tí onkur bar ótta fyri, at fólk fóru at rýma uttan at gjalda tað, tey høvdu keypt.

Ákæruvaldið hevur fyribils skuldsett Juan Pio Paiva, sum átti handilshúsini, og fimm onnur fólk í sambandi við eldin. Ein av teimum skuldsettu er sonur eigaran. Tey eru skuldsett fyri morð, og myndugleikarnir siga, at fleiri fólk afturat verða skuldsett.

Verða tey skuldsettu funnin sek, kunnu tey fáa upp í 25 ára fongsul, skrivar DPA.

Vanlukkan sunnudagin verður mett at vera tann ringasta í paraguay síðani kríggið ímóti Bolivia í tríatiárunum, og Nicanor Duarte Frutos, forseti, hevur lýst landasorg í tríggjar dagar.

# Bush og Kerry ganga við armbandi

**George W. Bush, forseti, hevur av og á eitt gult armband um vinstra arm. Nú hevur John Kerry eisini fingið sær eitt**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*





Tríggjar teir seinastu mánaðarnar hava amerikanarar keypt meiri enn sjey milliónir gul armbond. Tey kosta ein dollara, og teimum standa orðini »Live Strong«.

Tað er stovnurin Lance Armstrong Foundation, sum stendur aftan fyri tiltakið. Lance Armstrong er amerikanskur súklari og vann herfyri kappingina Tour de France sætta árið á rað. Hjá mongum er hann tann stóra ímyndin av, at tað ber til at vinna á álvarssomum sjúkum, tí Armstrong var illa sjúkur av krabbameini fyri nøkrum árum síðani.

Inntøkurnar av tí gula armbandinum fara til arbeiðið ímóti krabbameini, og hjá teimum báðum forsetaevnunum er tað sjálvandi umráðandi, at tey taka undir við einum tílíkum tiltaki. John Kerry hevur fleiri ferðir havt tað gula armbandið um vinstra arm, tá hann hevur hildið politiskar røður í seinastuni, og talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Mitch Stoller, sigur við tíðindastovuna AP, at George W. Bush, forseti, hevur eisini keypt sær eitt av teimum gulu armbondunum.

# ítróttur

Nr. 145 • mikudagur • 4. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú kemur Ikast til Føroya

**Komandi vikuskifti kemur eitt av heimsins sterkastu kvinnuhondbóltsliðum, Ikast Bording, til Føroya á vitjan, har liðið skal spæla tveir dystir móti ávíkavist kvinnulandsliðnum og føroyameistarunum úr Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Málverjin á føroyska kvinnulandsliðnum Fríða Petersen fær óivað nógv at gera, tá ið føroysku hondbóltskvinnurnar skulu royna seg móti einum av heimsins bestu kvinnuliðum, nevnliga Ikast Bording úr Danmark*

*mynd: Jens Kr. Vang*

Danska kappingin er óivað sterkast kappingin í heiminum, tá ið tað ræður um kvinnuhondbólt. Hetta sást eisini aftur í europeisku kappingunum í fjør, tí donsk lið vunnu allar tríggjar kappingarnar. Millum annað vann Ikast Bording sonevndu Cup Winners Cup, so tað er lagt upp til kvinnuhondbólt í heimsflokki, tá ið Ikast Bording um vikuskifti vitjar í Føroyum.

**Føroysku kvinnurnar fyrireika seg væl**

Ikast Bording kemur til Føroya hósdagin, og longu fríggjakvøldið er fyrsti dysturin á skránni. Tá skal danska liðið til Klaksvíkar, har tær skulu dystast við føroyameistararnar úr Stjørnuni. Tann dysturin verður í KÍ-høllini fríggjakvøldið klokkan 19.30.

Dagin eftir verður dystur í Havn, tá ið føroyska kvinnulandsliðið, sum stóð seg so væl í Italia fyrr í ár, fer at bjóða donsku gestunum av.

Venjarin hjá bæði Stjørnuni og føroyska kvinnulandsliðnum, Rógvi Nielsen, sigur, at liðini hava fyrireikað seg væl til spennandi avbjóðingarnar um vikuskiftið. Bæði landsliðið og Stjørnan hava vant tvær ferðir um vikuna leingi, hóast kappingin hevur ligið still, og seinastu tríggjar vikurnar hevur verið vant tríggjar ferðir.

Fyri at fáa eitt sindur av dystarvenjing í beinini undan vitjanini fara Stjørnan og kvinnulandsliðið at spæla tveir venjingardystir sínamillum í vikuni. Fleiri leikarar á liðnum hjá Stjørnuni eru eisini á kvinnulandsliðnum, og tí er avtalað, at í fyrra dystinum, sum verður í Klaksvík í kvøld, spæla hesir við Stjørnuni. Í annaðkvøld, tá ið dystur verður í Havn, spæla hesar so við landsliðnum, greiðir Rógvi Nielsen frá. – Á henda hátt fáa bæði liðini roynt seg við sterkastu manning í hvør sínum dysti, sigur hann.

Í mun til kappingina í Italia verða tveir leikarar á landsliðnum ikki við til dystin móti Ikast, og eru tað tær báðar, Lív Sørensen og Anna Maria Káradóttir, ið báðar eru burturstaddar. Hinvegin verður unga Ása á Neystabø úr Neistanum við. Føroyski landsliðshópurin verður tí hesin: Málverjar Helena Dam Poulsen, Tomma Petersen, Fríða Petersen. Útileikarar Nicolina Eyðbjørnsdóttir, Anna Kristina Samson, Katrin á Neystabø, Annika Ljósstein, Joan M. Djordjevic, Simona Hansen, Gurið Mortensen, Bára Skaale Klakstein, Una Olsen, Gunnleyg Berg, Heidi Maria Akselsen og Ása á Neystabø.

# FCK í Parkini í kvøld

**Hóast eingin ivi tykist vera í, at atgongumerkini til avgerandi uppgerð ímóti Monaco fara at verða vunnin, so tekur FCK uppgávuna í kvøld í stórum álvara**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*



*Todi Jónsson og liðfelagar hansara úr FC Keypmannahavn skulu í kvøld í 2. umfari av Champions League undankappingini enn einaferð basa Nova Gorica úr Slovenia í Parkini, áðrenn teir í næsta umfari skulu dystast við Champions League finalistarnar frá í fjør úr Monaco.*

Europeiska ævintýrið hjá føroysku feløgunum er liðugt fyri hesa ferð. Úrslitið var so soltið, sum tað plagar at vera. Tølini eru ógvuliga soltin. Undantakið er sjálvandi glæsiliga avrikið hjá HB á heimavølli.

Hóast føroysku feløgini eru fokin, so eru framvegis tveir føroyingar við í kappingini. Annar teirra er Julian Johnsson, sum saman við ÍA framvegis er partur av UEFA kappingini. Teir skulu ikki í eldin fyrrenn seinni í hesum mánaðinum.

Hin føroyingurin er Todi Jónsson, sum saman við liðfeløgunum í FCK seinnapartin í gjár fór undir seinastu fyrireikingarnar til heimadystin kl. 20 í kvøld ímóti slovenska NK Gorica. FCK vann útidystin 2-1.

Hóast FCK hevur gott útgangsstøði, so vísir dagsskráin, at Hans Backe og hinir í FCK taka uppgávuna í kvøld sum stóra avbjóðing. Klokkan 16.30 í gjár var venjing á skránni handan stongdar dyr í Parkini. Umboð fyri mótstøðuliðið og umboð fyri donsku og útlendsku pressuna høvdu tískil ikki møguleika út frá venjingini at gera sær metingar um, hvussu FCK liðið fer at síggja út í kvøld.

Átjan spælarar eru í FCK hópinum. Todi Jónsson telist millum hesar. Hann kappast við tríggjar aðrar um tvey álopspláss. Hinir eru Álvaro Santos, Jesper Bech og Peter Møller. Tann fyrst nevndi tykist vera fastur fúsur á liðnum.

Um tað gongur, sum tað kann roknast við, og FCK í kvøld spælir seg víðari til triðja og avgerandi innleiðandi umfarið, so skal FCK næstu vikurnar spæla tvær ferðir ímóti Monaco. Fyrri dysturin verður í Parkini um eina viku.

Møguleiki verður klokkan 18.30 í kvøld at fylgja við á TV3+ rásini, sum fer at senda úr Parkini ein hálvan tíma undan dystarbyrjan (klokkan 19 føroyska tíð).